# Vinnumálastýrið leggur eftir teimum lægstløntu

**Skal barnsburðarskipanin skerjast, kann tað ikki vera rætt at tað skal skarvast av hjá teimum, sum framman undan fáa minst, men tey, sum longu fáa mest, verða ikki rørd, sigur Føroya Arbeiðarafelag**

BARSILSSKIPAN
*Áki Bertholdsen*

Føroya Arbeiðarafelag mótmælir harðliga, at barnsburðarskipanin verður broytt, tí tað fer at raka tey lægstløntu meinast.

Hetta sigur Føroya størsta fakfelag í einum brævi til Vinnumálastýrið mikudagin.

Landsstýrið hevur lagt uppskot fyri tingið um at skerja barnsburðarskipanina, tí hon er ov dýr, sum er.

Í viðmerkingunum til uppskotið, viðgongur Landsstýrið, at broytingin fer at føra við sær, at tey, sum hava skiftandi inntøkur, fara sum heild at fáa minni útgoldið úr barnsburðarskipanini.

– Sum øllum kunnugt, eru tað fyrst og fremst tey ófaklærdu og sostatt tey við lægstu inntøkunum í samfelag okkara, sum hava skiftandi inntøkur, og tí er eyðsæð, at verður skipanin broytt, fer tað fyrst og fremst at fáa avleiðingar fyri tey, sum framman undan hava lægstu inntøkurnar, tí so fara tey eisini at fáa minni frá barnsburðarskipanini, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

## 35.000 krónur um mánaðin verða órørd

Felagið sigur eisini, at hetta fellur veruliga í eyguni, Vinnumálastýrið miðvíst vil skarva av hjá teimum sum frammanundan hava hægstu inntøkurnar.

– Ætlanin tykist framvegis at vera, at kvinna sum er í barnsburðarfarloyvi skal kunna fáa upp til kr. 35.000,00 frá skipanini.

– Vinnumálastýrið vil sostatt ikki skarva av hjá teimum sum framman undan forvinna upp til kr. 35.000,00 um mánaðin, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

– Hetta skal ikki skiljast so, at vit ikki unna øllum løntakarum fult lønarendurgjald í sambandi við barnsburð.

– Men um myndugleikarnir fara at skarva burturav hesum veitingum, kann tað ikki vera rætt, at tað skal raka tey, sum frammanundan fáa minstu veitingarnar.

Føroya Arbeiðarafelag sigur, at eisini í hesum máli tykist tað sum um samgongan aftur fer at seta tiltøk í verk, sum gera munin millum tann fátæka og tann ríka enn størri

– Eftir okkara tykki er tað púra skilaleyst at skerja stuðulin hjá teimum sum frammanundan bert fáa t.d. 6.000 krónur ella 10.000 krónur um mánaðin frá barnsburðarskipanini, samstundis sum stuðulin ikki skal skerjast hjá tí sum fær 35.000 krónur um mánaðin í stuðuli.

Føroya Arbeiðarafelag heitir tí á allar politisku flokkarnar um at vísa ætlanini at broyta barnsburðargrunnin, aftur.

– Hetta er eitt greitt álop á vanliga løntakaran, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

# Taptu fyrra hálvleik í stríðnum um vatnið í Lopra

**Í Lopra skulu tey nú gera av, um tey vilja dóm í rættinum, ella um tey góðtaka støðuna, sum hon er**

VATN
*Áki Bertholdsen*

Tað er føroya Landsstýrið, sum eigur rættin til vatnið, sum rennur úr Sumbiarbergholinum.

Tað niðurstøðu er Føroya Rættur komin til.

Tá ið Sumbiarbergholið ímillum Lopra og Sumba varð gjørt, kom rættiliga nógv vatn úr fjallinum og tað er síðani veitt í rør í eina á í Lopra.

Stórur áhugi hevur verið fyri vatninum at brúka til ymisk endamál, tí tað vísur seg at vera avbera gott.

Men so tók ósemja seg upp um, hvør átti vatnið.

Løgtingið samtykti, at tað var landið, sum átti rættin til vatnið og skuldi gera av, hvat tað skuldi brúkast til.

Men tað vildi lopransfólk ikki góðtaka. Hagastýrið helt fast um, at tað var hagin, sum átti rættin til vatnið og tað endaði við, at málið kom fyri rættin.

Teir rópti seg upp á eina lóg frá trýátiárunum, sum gevur grundeigaranum, haganum, rættin til at brúka "indsøer og vandløb".



*Tað eru ikki lopransfólk, men Landsstýrið, sum eiga rættin til vatnið, sum rennur úr bergholinum. Stórur áhugi er fyri vatninum, tí tað er so gott*

Tann stóri spurningurin hevur verið, hvussu langt niður í undirgrundina, hesin rættur gongur, onkur hevur sagt eitt hakaskot, onnur hava aðra meining.

Og í øllum førum halda lopransfólk, at tá ið vatnið úr bergholinum rennur í eina á í Lopra, er talan um omanávatn, sum hagin hevur tættin til.

## Landið eigur

Málið hevur síðani verið fyri í Føroya Rætti og síðani er tað blivið greitt, at dómarin er ikki samdur við hagastýrið í Lopra.

Í vikuni gjørdi Rætturin úrskurð, har hann gjørdi pørtunum greitt, hvat hann fór at døma, um tað kom so langt.

Og úrskurðurin gongur ikki hagastýrinum í Lopra á møti, men dómarin vildi geva teimum møguleikan at taka sakina aftur, áðrenn dómur varð feldur, so at teir einans komu at betala sín egna sakarmálskostnað.

– Skal dómur fellast í málinum, kemur hagin hinvegin eisini at betala fyri sakarmálskostnaðin hjá Landsstýrinum, sigur Jákup Joensen í hagastýrinum.

Hann sigur, at dómarin er komin til ta niðurstøðu, at hóast hagin hevur rætt til "indsøer og vandløb" kann tað ikki økja um rættin haganum, at landið hevur gjørt eitt berghol og at vatn rennur úr tí.

Jákup Joensen sigur, at teir, sum eiga hagan, skulu nú gera av, hvat teir fara at gera.

Tvíhalda teir um, at teir vilja hava dóm í málinum, hava teir hinvegin møguleikan at skjóta dómin inn fyri landsrættin fyri at vita, um hann kemur til aðra niðurstøðu enn Føroya Rættur.






